LM-039/2022

8

Fólkaheilsuráðið
The Faroese board of public health

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, 24. juni 2022
Skjalanr. 130400-2-2022/2
MM/HT

Svarskriv

Viðv. Lógaruppskot um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum til ummælis

Í teldubrævið 25. mai 2022 hava vit fingið hesi uppskot til ummælis:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av farsóttarmálsøkinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum á heilsumálsøkinum (myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarsmálsøkinum

Í uppskotinum til (Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum) verður í viðmerkingum undir "Kapittul 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kummunur" ikki mett, at tað er sannlíkt, at smittuuppsporan verður tikin upp aftur í nærmastu framtíð. Tí verður ikki mett, at tað fara at standast útreiðslur av smittuuppsporan í sambandi við yvirtøkuna.

Sum støðan er í løtuni, halda vit at henda meting skuld verið endurskoðað.

Vit hava ikki aðrar viðmerkingar.

Vegna Fólkaheilsuráðið

Magni Mohr, formaður

J.C. Svabosgøta 43 • FO-100 Tórshavn • Tlf.: +298 30 47 00

Heimasíða: www.folkaheilsa.fo • T-postur: fhr@folkaheilsa.fo